# Dyrka isolatiónina saman

*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*
*alvur@sosialurin.fo*

**Veggir og loft í Norðurlandahúsinum fingu nógv trýst um vikuskiftið, tá Dúndurfréttir, Føroya Symfoniorkestur og næmingar úr Tórshavnar kommunuskúla framførdu The Wall hjá Pink Floyd**

Veggir vóru tiknir niður, fyri at fáa pláss fyri øllum, ið vildu koma til frumsýningina av The Wall. Talan var um fólk í øllum aldrum, hóast tað sá út sum, at tað serliga vóru tey um 40 ára aldur, sum veruliga kendu nakað til tónleikin.

Summi høvdu sera torført við at vera sitandi á stóli sínum, tí fólk vildu helst staðið uppi og rópt og dansað, men hetta kann ongantíð vera nakað neiligt.

## Onki prát

Frá tí, at framførslan byrjaði vóru sera fá orð mælt millum fólkini. Sjálvt pørini, sum høvdu ov mikið at tosa um, tá tey komu inn, blivu púra kúrr.

Einasta ljóðið, ið ikki kom av pallinum vóru lógvabrestirnir, hvørja ferð tónleikurin steðgaði. Og meðan tónleikurin var, so vóru nøkur sum sungu við í sangunum, ið komu út á fyrsta sinni í 1979.

## Fyrri hálvleikur

Framførslan var skipað við einum steðgi, og tað einasta mann hoyrdi fólk fýlast eitt sindur á, tá komi var hálva leið, var, at kanska var ljóðið ikki nóg hart frá.

Hinvegin vóru eisini nógv fólk, sum fyrr hava verið til konsertir hjá Pink Floyd, sum enntá hildu hetta vera ein sterkari uppliving enn tað veruliga.

Í fyrru helvt á framførsluni var Another Brick in the Wall við. Hetta er lagið, sum øll kenna, og tá var tað, at øll gjørdu sær stóran ómak at rópa við.

Áðrenn nakar visti av, stóðu eisini næmingarnir úr kommunuskúlanum uppi á pallinum. Tey gjørdu sær ómak, at vera eitt sterkt rópikór, sum ikki vil hava nakra uppaling.

## Seinni hálvleikur

Tá fólk komu innaftur frá steðginum, byrjaði tað rímiliga friðarligt. Fólk komu innaftur í einsemið, og tað var skjótt, at tónleikurin aftur hevði fangað allar áhoyrararnar.

Seinni varð lagið Confortably Numb spælt. Tá var tað, at tey fáu, sum kanska ikki alla tíðina høvdu verið hugtikin veruliga blivu fangaði.

Nú var onki mark fyri, hvussu hart ljóðið var, og hetta sá út til at virka heilt væl, tí tá liðugt var at spæla, mundu lógvabrestirnir ikki fingið nakran enda.

Tá framførslan var liðug var sera gott lag á fólki, og tað skilst, at hetta var ein framførsla, sum veruliga nýtir tað mesta av góðu umstøðunum í Norðurlandahúsinum.



*Fólk vóru á einum máli um, at The Wall var ein sterk uppliving, har samspælið millum rokk og symfoniorkestur riggaði heilt væl*

## Søgan

Pink er ein lítil drongur. Hann missir pápan í kríggi og hevur bert mammu sína eftir. Hon verjir hann meira enn gott er. Hon gevur dronginum líka stóra mongd av kærleika og ótta. Hetta hjálpir dronginum at byggja ein sterkan mentalan múr. Í skúlanum verður drongurin væl bukaður.

Sum hann gerst eldri stríðist hann meira og meira við hendan múrin, sum rúsevni, eitt vánaligt hjúnarlag, sum eisini fær sín enda, alsamt leggja fleiri klípi í múrin.

Gjøgnum søguna hoyra vit alsamt fleiri hendingar, ið leggja fleiri klípi í múrin.

Tá hann gerst eldri verður Pink ein rokkstjørna. So hvørt sum lívið heldur fram, verður Pink alsamt meiri innibyrgdur og fer veruliga í hundarnar.

Tá alt kemur til alt finnur hann loysnina. Brýtur múrin niður og biður orsaka til sínar nærmastu vinir, sum hava kent mest til ræðslu-, rúsevna og paranoiamúrin hjá honum.

## Mamman alt at siga

***Av tí, at mamman hevur so øgiliga nógv at siga, hevur Sosialurin valt at endurprenta yrkingina Mother í føroyskari umseting eftir Thorben Johannesen, har Roger Waters greiðir frá, hvussu barnasinnið kann fara í hundarnar.***

***Mamma***
***Mamma, heldur tú teir fara at tveita bumbuna,***
***mamma, heldur tú teimum fer at dáma songin,***
***....***
***mamma, skuldi eg bygt mær ein múr.***
***mamma, skuldi eg stillað upp til forsetavalið,***
***mamma, skal eg trúgva landsstjórnini,***
***mamma, fara teir at seta meg í skotlinjuna.***
***mamma, fari eg veruliga at doyggja?***
***ver trygt, lítla barnið, grát ikki,***
***mamma skal nokk síggja til,***
***at allir tínir marrudreymar ganga út,***
***mamma skal nokk geva tær allan sín ótta,***
***mamma skal hava teg beint her***
***undir sínum veingjum.***
***Hon lovar tær ikki at flúgva,***
***men kanska skalt tú sleppa at syngja,***
***mamma skal nokk gera tær tað hugnaligt og fjálgt,***
***áh, barnið, barnið,***
***mamma skal nokk hjálpa tær at byggja múrin,***
***...***
***mamma skal ansa, at einki ljóð sleppur fram at tær,***
***mamma skal nokk sita uppi og bíða,***
***til tú kemur heim,***
***mamma skal nokk fáa uppspurt, hvar tú hevur verið.***

*Umsett av Thorbeni Johannesen í bókini Samfelagsfrøði 1.*